Búskapur og vinna:

Flúgva aftur

Verkfallið hjá tyrluflogskiparunum, sum flyta arbeiðsfólk til og frá teimum donsku boripallunum í Norðsjónum, endaði í gjár. Tá atkvøddu 17 av teimum 18 flogskiparunum fyri einum uppskoti um nýggjan sáttmála við arbeiðsgevaran, kanadiska felagið Canadian Helicopter Corporate.

Verkfallið hjá tyrluskiparunum vardi eina viku, og hesar dagarnar noyddust donsku feløgini at flyta arbeiðsfólkið við skipi til og úr Esbjerg.

Statoil keypir

Bretska blaðið The Buisness skrivar, at Statoil umhugsar at keypa bretska oljufelagið Enterprise Oil. Prísurin sigst vera slakar 40 mia. krónur.

Verður handilin veruleiki, er tað størsta norska keypið í útlandinum nakrantíð. Leiðslan í norska felagnum vil ikki gera viðmerkingar til tíðindini í bretska blaðnum. Norskir marknaðarfrøðingar siga seg ivast í, at tíðindini eru sonn, men teir leggja tó afturat, at ein handil sum hesin er kortini ikki óhugsandi.

Flogkapping

Kappingin um ferðafólkini á leiðini Billund-London er hørð. Írska felagið Ryanair hevur havt nógv ferðafólk í sínum flogførum á ruruni, men nú hevur Maersk Air rættiliga lagt seg út í kappingina.

Sunnudagin kunngjørdi danska flogfelagið, at tað fer at skipa fyri serliga bíligum ferðum hetta til í summar og kanska árið út, soleiðis at fólk bert skulu gjalda 750 krónur aftur og fram íroknað avgjøld. Treytin er, at fólk eru burturi náttina millum leygardag og sunnudag.

Keld Moesgaard, rutustjóri hjá Maersk Air sigur, at felagið á hedan hátt væntar at fáa 20.000 fleiri ferðafólk á leiðini millum Billund og London. Samstundis hevur Maresk Air avgjørt at hava bíligar ferðir millum Keypmannahavn og London.

UTTAN ÚR HEIMI

Gudstænasta endaði í blóðbaði

Ein amerikanskur trygdarmaður á veg úr kirkjuni, sum yvirgangsmenn søktu at sunnudagin
Mynd: Reuters

Fimm fólk doyðu, og 45 fingu skaða, tá tveir tveirru granatir inn í eina proteatantiska kirkju í Islamabad sunnudagin

PAKISTAN
Árni Joensen

Umleið 75 fólk, tey flestu útlendingar, vóru til guðstænastu, tá ein ella tveir álopsmenn komu inn í kirkjuna, har teir tveittu tríggjar granatir eftir kirkjufólkinum.

Sambært pakistanskum myndugleikunum doyðu fimm fólk. Amerikanska sendistovan í Islamabad segði, at tvey av teimum deyðu vóru amerikanarar. Tað snúði seg um eina kvinnu, sum arbeiddi á sendistovuni, og 17 ára gomlu dóttur hennara. Hini deyðu vóru ein afghani, ein pakistani og ein ókendur maður.

Millum tey skaddu vóru 12 pakistanar, 10 amerikanarar, fimm bretar og ein týskari.

Norðurlond hava sendistovur í Islamabad, og norðurlendskir diplomatar og onnur sendistovustarvsfólk plaga javnan at vera til guðstænastu, men sunnudagin var eingin norðurlendingur í kirkjuni, sum varð álopin.

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, fordømdi alt fyri eitt atgerðina og segði, at hon uttan iva var liður í altjóða yvirganginum. Tað sama segði amerikanski forsetin, George W. Bush.

Tilburðurin hevði við sær, at pakistansku myndugleikarnir hava hert vaktarhaldið við allar kristnar kirkjur í landinum, og í Karashi sóst hermenn standa á varðhaldi við fleiri kirkjur. Álopið sunnudagin var ikki tað fyrsta av sínum slagi í Pakistan. Tann 28. oktober í fjør søktu menn at einari aðrari kirkju, og ta ferðina doyðu 15 fólk.

Thatcher vil hava Bretland úr ES

Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin, Margareth Thatcher, heldur, at Bretland eigur at taka seg úr ES

BRETLAND
Árni Joensen

Í einari nýggjari bók endurtekur Margareth Thatcher, at teir flestu trupulleikarnar, sum heimurin hevur havt í hennara tíð, hava havt sín uppruna á evropeiska meginlandinum. Hinvegin vórðu tað onnur t.v.s. uttan fyri evropeiska meginlandið, sum loystu trupulleikarnar, skrivar hon.

- Tað verður sagt, at Bretland kann ikki fara burtur úr ES, men sannleikin er, at evropeararnir hava størri brúk fyri okkum, enn vit hava fyri teimum, skrivar Thatcher, sum heldur, at tað hevði serliga gagnað bretsku fiskivinnuni og landbúnaðinum, fór landið burtur úr ES.

Tann 76 ára gamla Thatcher skrivar, at bretar fáa heldur ongan fyrimun á tí trygdarpolitiska økinum, og tí mælir hon til, at hann næsta konservativa stjórnin í London skal fara undir at taka landið burtur úr Evropasamveldinum. Sitandi stjórnin eigur at leggja fyri við at endursamráðast um treytirnar fyri bretska limaskapinum.

Margareth Thatcher var bretskur forsætisráðharri frá 1979 til 1990, og alla sína politisku tíð var hon sera ívingasom um ES-samstarvið. Eftirmenn hennara í konservativa flokkinum hava ikki verið so svgjørdir og hava roynt at káva út yvir ta avgjørdu støðuna hjá floksfelaganum.

Úr Norðurlondum:

Betri fráboðan

Í Noregi hevur Torild Skogsholm, samferðslumálaráðharri boðað frá, at tað er neyðugt at ávara fólk í ferðsluni betur ímóti vandanum fyri skalva- og skriðulopum. Um vikuskiftið doyðu tvey fólk, tá ein skalvur leyp oman yvir ein buss í Hordalandi. Busurin endaði á sjónum, og tað var eitt undur, at bara tvey fólk doyðu, sigur løgreglan á staðnum.

Norsku vegamyndugleikarnir siga, at tað fer at kosta einar 12 mia. krónur at tryggja teir vandamestu vegirnar ímóti skalva- og skriðulopum. Á ársins fíggjarlóg eru bara játtaðar góðar 300 mió. krónur til endamálið. Við hesari játtanini fer tað at taka 45 ár, áðrenn arbeiðið kann verða liðugt, siga vegamyndugleikarnir.

Valdskvinna

Ein kanning hjá danska Børsens Nyhedsmagasin vísir, at valdið í Danmark hevur fingið eina heilt øðrvísi samansetting, enn tað leingi hevur havt. Kanningin vísir m. a., at fakfeløgini hava als ikki tað vald, tey hava havt, men at fyritøkurnar ella vinnulívið hinvegin hevur fingið størri vald. Í Danmark verður mest tosað um, at forkvinnan í Framburðsflokkinum, Pia Kjærsgaard, er á sætta plássi á einum lista yvir teir einstaklingarnar, sum hava størst vald í Danmark.

Fangar á flot

Sum er bíða næstan 2.000 dømdir norðmenn eftir at sleppa í fongsul at sita dómin. Trupulleikin er, at fongslini eru ov fá, og nú mælir stórtingslimurin Andre Kvakkestad til at byggja fongsul á sjónum fyri at loysa trupulleikarnar. Tingmaðurin vísir á, at í Bretlandi hava teir fleiri flótandi fongsul, og at tey hava víst seg at rigga væl.

Men norski løgmálaráðharrin, Odd Einar Dørum, heldur lítið um hugskotið. Hann heldur hinvegin, at tað almenna eigur at byggja fongsul á onkrum av teimum nógvu grundstykkjunum, sum staturin eigur ymsastaðni kring landið.

80 ár blást burtur

Fleiri fyrrverandi spælarar vóru komnir at hátíðarhalda 80-ára dagin saman við teimum núverandi. Eisini høvdu hesir tríggir vetaranarnir leita sær oman á Frúutrøð til eina hugnaliga løtu.

Teir eru frá vinstru: Gunnleivur Mouritsen, Karl Guttesen og Janus Sørensen.

FELAGSLÍV
Jóanes N. Dalsgaard

Fríggjadagin 14. mars vóru liðin áttati ár síðani Harmoniorkestrið GHM varð stovnað. At hátíðarhalda dagin hevði orkestrið skipað fyri einum lítlum tiltaki í felagshølunum á Frúutrøð í Havn, leygardagin. Orkestrið hevði skipað fyri einari lítlari konsert, og hevði boðið foreldrum, makum, gomlum spælarum og øðrum at koma at lurtað. Konsertin var av tí lætta slagnum og var hon kryddað við úrvaldum brotum úr gerðabókunum felagsins ígjøgnum 80 ár. Aftaná konsertina bjóðaði orkestri ein bita, og kundu fólk tá nýta høvi til at fáa sær eitt prát um gamlar og yngri dagar.

Tað er bornholmarin Georg Caspar Hansen, sum hevur lagt navn til GHM. Hann kom til Føroya seinast í 19. øld at starvast í Havn, sum bakari. Hann var óførur tónleikari, og William Heinesen skal hava sagt um hann, at um hann bara hevði havt nóg nógvar munnar og armar, so hevði hann einsamallur kunna spælt uppá eitt heilt súmfoniorkestur. Georg Hansen – ella Bakar Hansen, sum hann vanliga varð nevndur – lærdi nógv fólk at spæla uppá ymisk ljóðføri, og hann stjórnaði bæði kórum og smáðum orkestrum. Í 1922 stovnaðu gamlir tónleikanæmingar hjá Bakar Hansen eitt orkestur, og í takklæti til lærara sín nevndu teir orkestrið Georg Hansens Minde, stytt GHM.

Síðani orkestrið varð stovnað hevur tað húsast ymsa staðni í býnum. Eina tíð helt orkestrið til í gamla kommunuskúla í Havn, sum nú er býráðshús. Seinni flutti orkestrið niðan í "barakkina" í Kongagøtu. Í barakkini eru tvær skúlastovur, og har húsaðust tá teir yngstu flokkarnir. Umstøðurnar hjá vaksnum fólkið vóru tí ikki tær bestu. Fyrst og fremst tí at stólarnir, sum spælararnir høvdu at sita á, vóru ætlaðir børnum í 1. flokki.

Í 1970-árunum upplivdi orkestrið eina rættiliga kollvelting. Henda kollvelting var fyrst og fremst onglendinginum Hugh Watkins fyri at takkað. Watkins, sum fólk nevndu hann, var ein tónleikaligur túsundkunstnari, sum orðini hjá William Heinsen um Bakar Hansen høvdu passa væl uppá. Watkins var ein eldsál, sum kveikti hug til tónleik hjá nógvum børnum og ungdómum. Nógvir av næmingunum hjá Watkins fóru at spæla í GHM. Hetta var ein kollvelting fyri orkestrið, bæði tí at miðalaldurin á spælarunum lækkaði munandi, men ikki minst var tað ein kollvelting at fleiri konufólk nú komu at spæla við. Síðani tá hevur GHM verið eydkent av stórari aldursspjaðing og jøvnum kynsbýti.

Í 1993 hendi enn ein kollvelting í søgu orkestursins. Tá fekk orkestrið nýggj og skræddaraseymað hølir at fara í. Hølini, sum eru á loftinum á musikkskúlanum á Frúutrøð, vóru sett í stand við sjálvbodnum arbeiði summari 1993. Orkestrið hevur nú tær bestu umstøður tey kunnu ynskja sær, siga tey.

Orkestrið hevur vanliga nógv á skránni. Fyri tað nógva er talan um afturvendandi tiltøk. Eitt av hesum er ein lítil konsert í sambandi við árligu kvøldskúlaframsýningina á Eystúrskúlanum, sum í ár verður 22. mars. Eitt annað afturvendandi tiltak er árliga Musikkstevnan. Í ár skal GHM vera vertur fyri Musikkstevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum 26. og 27 apríl. So hóast aldurin er høgur, tykist ellin ikki bilað hjá Harmoniorkestrinum GHM.

Tey kýta seg at geva áhoyrarunum eitt gott upplivilsi.

GHM hevur í løtuni heilar tríggjar venjarar.

Frá vinstru: Martin Mouritsen, Andrea Heindriksdóttir og Kenneth Jones.